# TILTØK

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti v/ Jannet & Maibritt Olsen.
Fríggjakvøldið kl. 20 After Eight.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Team úr Bergen luttekur.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Martin de Leur í Mariukirkjuni. (Talvan gongur fyri teimum, ið lesa til prest, í Keypmannahavnar bispadømi). Kl. 14 Sunnudagsskúli.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Mikudagin kl. 19.30 Skótar 5.-8. fl.)
Hósdagin kl. 18 1. Úlvalið (1.-2. fl.), kl. 20 Bíbliutími v/ Jóhs. Mortensen, Argir – Heb. 11.
Fríggjadagin kl. 20 Ungdómsgudstænasta v/ Bergur D. Joensen – Innsavnan fyri HMU.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta, kl. 14 sunnudagsskúli og junior, kl. 15 Barnakórið venur, kl. 18 Møti v/ Rúna Mortensen, Argir o.fl.
www.koma.fo

**Samkoman Lívdin**
*Í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin á familjumøti kl. 10.30 er evnið: Hvat segði Jesus um Bíbliuna? og tilbiðjunarmøti kl. 12 er evnið: 1. Korint – At geva. Á báðum møtunum talar Zacharias Zachariasen. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúlin er kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
www.livdin.fo

**Ebenezer**
Í kvøld kl. 20 halda mánaðarmøtini við evninum: Ávøkstur Andans – Gleði.
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Mánaðarmøti við evninum: Ávøkstur Andans – Friður, kl. 21 Útimøti.
www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti har ung úr Fuglafirði luttaka.
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Regin Høgnesen.

**Samkoman Rhema Staravegur 5**
Mikukvøldið kl. 20 Møti við ungdómi úr Alterna úr Danmark.
Sunnudagin kl. 11 Møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**Karisma**
Hvítusunnustevnan 2003 verður í døgunum 6.-9. juni í Ítróttarhøllini á Hálsi, har tiltøk verða fyri allar aldursbólkar. Nærri verður lýst seinni.

**KFUM og KFUK í Havn**
Hósdagin kl. 19.30 í KFUK: Bíbiltími.

**Samkoman Immanuel**
Fríggjakvøldið kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í annaðkvøld kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Ólavi Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
www.filadelfia.fo

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti við Eiler Johannesen.
Mánadagin kl. 19 andakt í eldrasambýlinum.
Telefonandaktin 424741.

**Vestmanna missiónshús**
Hóskvøldið kl. 20 Samtalumøti við evninum forbøn.
Fríggjakvøldið kl. 20 Møti við Kajberg Davidsen o.ø.
Leygarkvøldið kl. 20 Útimøti við eysturoyingum, aftaná lovsangsløta í missiónshúsinum.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli og kl. 19 Møti við Margeir Toftegaard o.ø.
Sangbólkurin Gittit syngur.

**Samkoman í Berøa**
Mikukvøldið kl. 19.30 Bønar- og uppbyggingarfundur, Karl Jóhan Nielsen talar um evni: Hvat sigur Skriftin, eiga vit at giftast? Ungdómsbólkurin á Toftum syngur.
Sunnudagin kl. 11.30 Sunnudagsskúli, kl. 11.30 Minnismáltíð Harrans, kl. 15 Løta fyri foreldrum at børnum undir 2 ár, kl. 19 Evangel. fundur við nógvum lovsangi. Ungdómskórið í Ebenezer, barnakórið í Berøa og fleiri syngja. Kári á Torkilsheyggi og Dánjal í Skemmuni tala.

**Keldan**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Leif Høj.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 11 Barnamøti, kl. 19 Evangel. møti. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Soli Deo Gloria**
Mikukvøldið kl. 20 Kvinnurnar samlast.
Hóskvøldið kl. 20 Pizzahugnakvøld fyri ung.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**Getsemane**
*á Brekku 19 Klaksvík*
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20 Spælicafé fyri ung.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við André Matras.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 5. mai:*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-18 Veving á loftinum. Seyma teppir saman
kl. 14-18 Kortspæl, landastrok, telving, dart og onnur spøl
*Týsdagin 6. mai:*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur, Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Prát
*Mikudagin 7. mai:*
kl. 10-15 Opið hús
kl. 15 Vitja Dimmalætting. Hittast uttanfyri Dimmalætting á Smyrilsvegi 13
*Hósdagin 8. mai*
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát – Brandur Petersen
*Fríggjadagin 9. mai:*
kl. 10-15 Opið hús
kl. 14.30 **Fyribyrging/-fólkaheilsa,** Bill Justinussen

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Eysturoyar Gongufelag**
Sunnudagin 11. mai verður gongutúrurin Skálabotnur – Selatrað á skránni. Møguliga verður farið niðan á Reyðafelstind. Frásøgumaður er Hallgrím Johannesen. Túrurin er miðaltungur og tekur uml. 6 tímar. Møtt verður við SEV støðina í Skálafirði kl. 14.00.

**Dagtilhaldið í Vági**
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

**Tilhaldið í Sandoynni**
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl. 14–17.00. Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Mikudagin 7. mai*
Spurningar úr føroyska spælinum Landastrok verða bornir fram.
**Mánadagin 12. mai** fara vit útferð til Húsavíkar har Hanus undir Leitinum sigur frá. Aftaná verður farið í Ísansgarð til ein drekkamunn. Farið verður úr Tilhaldinum kl. 14 við bussi til Húsavíkar. Kostnaður fyri túrin íroknað drekka er 50 kr.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61 655400.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvønn hósdag kl. 17.30 til 18.30 og sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20-21.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tórsgøta 5 (inngongd vestanfyri). Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

**BRÚKARASAMTAKIÐ**
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919, hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210, gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832, trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883, kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum**
er opin frá kl. 9.00-12.00 mánadag, mikudag og hósdag fyri foreldrum við børnum uttan ansing.

**Heilaskaðaráðgeving**
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Samband við felagið fæst við at ringja tlf. 22 95 83.
Umsóknarbløð til Heimavirkisleguna í Danmark í summar kunnu fáast við at venda sær til felagið.

## KONFIRMATIÓN

Sunnudagin 11. mai konfirmerast í Avedøre kirkju, Marjun Fuglø millum Garðarnar.
Adr.: Bymuren 42, 1 th., DK2650 Hvidovre.

11. mai konfirmerast í Låsby kirke Sune Gaardlykke Jensen, sonur Heidi Gaardlykke og Poul Jensen.
Adr.: Vestergade 78, 8464 Galten.

## BRÚDLEYP

3. mai *giftust* í Nathanaelf kirke Vilda Bech, Havn og Thomas Baadsgaard, Dragør.

Hósdagin 8. mai giftast í Býráðsskrivstovuni í Havn Josephine D. B. Fernandes (Penny), Ozamiz City á Filipsoyggjunum og Ragnar Heinesen úr Kunoy. Borðhald verður á Hotel Hafnia kl. 19.00 fyri innbodnum.

Leygarmorgunin 10. mai giftast í Prestagarðinum í Fuglafirði Marjun Dahl, Oyri og Jan Erik Jacobsen, Fuglafirði. Opið hús verður í heiminum frá kl. 10.00 til kl. 16.00.

Leygardagin 17. mai giftast Heidi Ingun Skillicorn og Búgvi Poulsen.
Adr. 10.Birch Hill Grove,
Onchan IM3 – 4EJ
Isle of Man,
E-mail: abighi@manx.net

Leygardagin 24. mai kl. 14.00 giftast í Nebo á Toftum Sóleyð Poulsen, Eiði og Heri Jacobsen, Toftir. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleðast saman við brúðarparinum, biðjast vinarliga um at siga frá á tlf. 423101, 222142 ella 222027 áðrenn 10. mai.

Leygardagin 24. mai kl. 15.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Maigunn Danielsen og Eyðun Jacobsen, bæði úr Klaksvík. Veitsla verður fyri innbodnum kl. 17.00. Eftir kl. 21.00 verður vælkomst í Skálanum.

Leygardagin 5. juli kl. 16.00 giftast í Sands kirkju Anita Simonsen og Herálv Jensen av Sandi. Veitslan verður í Virkinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 361920, 361111 ella 361484 í seinasta lagi 13. juni.

## SILVURBRÚDLEYP

Týsdagin 13. mai hava Sólfríð og Adolf Jacobsen í Klaksvík silvurbrúdleyp. Vælkomst verður undir Klakki 13 frá kl. 18.00.

## GULLBRÚDLEYP

Sunnudagin 18. mai hava Oda og Joen Elias Jakobsen úr Havn gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 17. mai í Meinigheitshúsinum í Havn kl. 19.00. Tey, ið vilja koma og gleðast saman við okkum, kunnu ringja á telefon 312703 áðrenn mánadagin 12. mai.





*Bygdarráðsfundur í Sumba: Jacob Poulsen, Niclas Hentze, Poul Johannus Poulsen, Snæbjørn Vestergaard og Beinta Poulsen*

*(Mynd: D. Olsen)*

# Jacob kemur fyri Jacob

**Bygdaráðið í Sumba hevur umskipað seg í samband við, at borgarstjórin er farin í landsstýrisessin í Fiskimálaráðnum**

POLITIKKUR
*Dagfinn Olsen*

Í samband við at Jacob Vestergaard hevur tikið við sum landsstýrismaður í fiskivinnumálum, er hann farin frá sum borgarstjóri. Hann satt í kommununi í Sumba og var formaður, borgarstjóri.

Nú hevur Beinta Poulsen tikið sessin í kommununi og kommunustýrið hevur umskipað seg. Formaður, borgarstjóri, er nú Jacob Poulsen og nýggjur næstformaður er Snæbjørn Vestergaard. Hini í bygdarráðnum í Sumba eru Niclas Hentze, Poul Johannus Poulsen og Beinta Poulsen.

## Minningarorð um Masu Samuelsen, Tórshavn

**(ættað úr Froðba)**



Tað var ein sorgfullur dagur, tá vit fingu boðini um, at tú ikki var her meira. So tað er við tungum hjarta eg skrivi hesi minningarorð um teg, kæra vinkona, men tað hevði verið betur, um tað var ein onnur gleðilig orsøk at skriva um, men so skuldi ikki vera.

Eg visti í mong ár, hvør Masa var, uttan at kenna hana. Eg lærdi hana at kenna, tá hon flutti inn á Mikkjalstrøð 6, har vit eisini búðu. Tá eg kom niður í kjallaran at vaska klæði, var tú eisini í gongd við at vaska klæði, so soleiðis byrjaðu vit at práta saman, og tað bleiv til 26 ára langan vinskap. Vit kundu hugna okkum saman í tímavís, tú var altíð so fryntlig og glað, so tað var ein stór gleði at kenna teg. Børnini hjá okkum, vart tú eisini ógvuliga góð við, tað sama, sum tú var góð við øll. Tú hevði eitt hjarta av gulli, tað vita øll, sum stóðu tær nør

Tín gleði var stór, tá tú møtti Hans, sum bleiv tín góði stuðul og góði maður. At Hans var og er ein hampamaður, tað vit vit eisini, og at tit vóru ógvuliga glað fyri hvønn annan, ivaðist ongin í, sum kendi tykkum bæði. At tit gleddu tykkum nógv til, at Hans skuldi pensionerast, tit høvdu nógvar planir og so skuldu tit njóta tað, men so skuldi ikki vera.

Hvørja ferð vit komu heim til Føroyar at ferðast, var tað ein sjálvfylgja, at vit skuldu koma til tykkum, áðrenn vit fóru suður. So ringdi tú niður, fyri at hoyra, hvat vit kundu tonkt okkum av føroyskum mati, tí so vildi tú kóka ein góðan bita til okkum. Og so var, og ongin ivi um, at tað kom væl við hvørja ferð og vit føldu okkum sum heima hjá tær og Hans. Tit vistu ikki, hvussu blíð tit skuldu vera. Sjálvt nú tá tú vart farin og eg prátaði við Hans, vóru hansara orð, at vit vóru líka so vælkomin til hansara, sjálvt um tú ikki er har. Sjálvandi verður tað aldrin tað sama, men so kunnu vit minnast teg saman.

Sjálvt um heilsan, tey seinastu árini, var byrjað at bila, so var humørið altíð gott, og tú kundi skemtast sum nakar.

Fyri 25 árum síðani, tá vit fluttu niður at búgva, gjørdi tú ein sang til mín, sum eg havi goymt øll árini. Men sama dagin, sum vit fingu deyðsboðini av tær, setti eg meg at lesa sangin og nógv góð minnir kom eg at tonkja uppá. Men sangurin vil altíð vera eitt gott og dýrabart minni fyri meg.

Góði Hans, Manne og Kenn, tit hava mist tað besta og kærasta tit áttu, má Harrin geva tykkum styrki í stóru sorg tykkara, tankar okkara eru eisini hjá tykkum.

Nú vil eg enda við hesum versinum.

*Så lukker vi dig i hjertet ind*
*og gemmer dig inderst inde.*
*Der skal du fredfyldt bo*
*i vort sind,*
*som et kært og dyrebart minde.*

Friður veri við tær, kæra Masa

**Lydia**


HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo




Hósdagin 08.05. kl. 20[00]
Hósdagin 08.05. kl. 22[45]




Hósdagin 08.05. kl. 20[45]




Hósdagin 08.05. kl. 18[45]




Hósdagin 08.05. kl. 23[00]
- Seinasta sýning -




Hósdagin 08.05. kl. 18[00]
- Seinasta sýning -

KOMANDI FILMUR




Frumsýning
Fríggjadagin 09.05

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu